## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig – fríggjanáttina niður í 3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og eitt skifti regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin upp í stívt andøvsgul av suðri, mánadagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Vilja útseta fyrsta snapsin

**Størsta málið er, at tey ungu byrja so seint at drekka sum gjørligt, og at tey vaksnu eru góðar fyrimyndir. Á tann hátt slepst lættari undan misnýtslu, halda 11 norðurlendskir ungdómar, sum í hesum døgum hava seminar í Losjuni í Havn**



*NORDGU (Nordens Godtemplar Ungdomsråd) hevur í hesum døgum seminar í Losjuni í Havn, tey nevna »Rúsdrekka og fólkaræði«*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FRÁHALD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað sum hevur størstan týdning er, at tey ungu útseta fyrsta snapsin, at tey ikki byrja ov tíðliga at drekka.

Hetta er tað størsta málið, halda 11 ungfólk úr Norðanlondum, sum í hesum døgum hava seminar í Losjuni í Havn, nevnt »Rúsdrekka og fólkaræði«.

Hesi 11 ungu fólkini eru úr Finnlandi, Svøríki, Noreg og Íslandi, og tey eru øll limir í NORDGU (Nordens Godtemplar Ungdomsråd). Mikukvøldið skipa tey fyri tiltaki í Losjuni í Havn fyri ungfólk. Í løtuni hevur Ungtemplara Samband Føroya ongar virknar limir, men NORDGU-limirnir vilja fegnir hjálpa til at fáa virksemi aftur í felagið. Tey hava verið á gøtuni í Havn og tosa við ungfólk og boðið teimum til tiltakið, sum verður í Losjuni í Havn í kvøld (mikukvøld).

Á seminarinum umrøða tey samstarv millum feløgini í ymsu londunum. Tey samanbera lóggávuna fyri at finna fram til, hvar tey skulu samstarva, og hvussu tey kunnu læra av hvørjum øðrum.

Tey fegnast øll um, at rúsdrekkalóggávurnar í Norðanlondum sum heild – undantikið Danmark – eru rættuliga strangar.

– Tað ræður um at avmarka atgongdina til rúsdrekka, tí tað vísir seg, at lættari tað er at fáa fatur á rúsdrekka, størri verður misnýtslan og samfelagsligu trupulleikarnir, siga tey.

Tey vóna eisini, at ES kann læra nakað av rúsdrekkalóggávunum í Norðanlondum – havandi í huga, at bæði Finnland og Svøríki eru partar av ES, sum ikki tykist so fegið um strongu rúsdrekkalógirnar í Norðanlondum.

– Vit hava valt eitt lív uttan rúsdrekka, tí tað halda vit vera tað besta. Men vit kunnu sjálvandi ikki gera av, hvussu onnur skulu liva. Men tað kann staðfestast, at jú fyrr fólk fara at drekka, størri er vandin fyri misnýtslu og harvið stórum samfelagstrupulleikum. Tí vilja vit fegin virka við til, at tey ungu so seint sum gjørligt fara at drekka, siga NORDGU limirnir, sum Sosialurin hitti týsdagin.

Tey halda, at ein háttur at gera hetta er, at rúsdrekka ikki er ov lætt at fáa fatur og – og ikki minst, at foreldur og onnur vaksin eru góðar fyrimyndir og ikki drekka seg fullan framman fyri børnum.



**Vika 40 – 9. okt.**

1. Centrum:
**28 - 06 - 41 - 15 - 44 - 71 - 22 - 47 - 75 - 69 - 18 - 23**

1. Ramme:
**68 - 36 - 53 - 29 - 30 - 32 - 21 - 11 - 33 - 04 - 08 - 62 - 02 - 49 - 27 - 51 - 57 - 37 - 64 - 16 - 70 - 03 - 66 - 65**

Fuld plade:
**74 - 43 - 07 - 67 - 31 - 58 - 25 - 35 - 40 - 14**

Fri spil: **B__EN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **129.502,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **22.352,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **11.191,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **348,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **36,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 21 |
| Tromsø | 10 |
| Bergen | 21 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 20 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. sunnan fyri Ísland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1003 hPa. yvir Írska Havinum fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið sunnan fyri Írland fer spakuliga norðureftir og verður yvir Føroyum fríggjamorgunin. Eitt djúpt lágtrýst yvir Atlantshavinum á 47N-35V fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjakvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/10 kl. 06[00]– 11/10. 06[00]. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 10/10 kl. 06[00]– 11/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 77,4 mm



**TIPS 12 úrslit**
**Vika 40 – 9. okt.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AB - Nykøbing F All. | **2** |
| 2. | Fremad Am. - FC Fredericia | **2** |
| 3. | Køge - Kolding FC | **x** |
| 4. | Lyngby - Brønshøj | **1** |
| 5. | Randers FC - HIK | **1** |
| 6. | Ølstykke - Brabrand | **2** |
| 7. | FC Roskilde - Søller.-Vedbæk | **2** |
| 8. | Holbæk - Hvidovre | **1** |
| 9. | B 1913 - Silkeborg 2 | **2** |
| 10. | Hjørring - Varde IF | **2** |
| 11. | Holstebro - Jetsmark | **x** |
| 12. | Thisted - Næsby | **2** |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 11 røtt: | **14.182,- kr.** |
| 10 røtt: | **1.118,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober Fyrra kvarter
14. oktober Mánin næstur jørðini
17. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 13. Okt. | 03.46 | 16.10 | 02.46 | 15.10 | 03.01 | 15.25 | 05.46 | 18.10 | 06.46 | 19.10 | 02.01 | 14.25 | 01.01 | 13.25 | 04.01 | 16.25 | 05.01 | 17.25 | 03.31 | 15.55 | 04.46 | 17.10 |
| 14. Okt. | 04.35 | 16.58 | 03.35 | 15.58 | 03.50 | 16.13 | 06.35 | 18.58 | 07.35 | 19.58 | 02.50 | 15.13 | 01.50 | 14.13 | 04.50 | 17.13 | 05.50 | 18.13 | 04.20 | 16.43 | 05.35 | 17.58 |
| 15. Okt. | 05.21 | 17.44 | 04.21 | 16.44 | 04.36 | 16.59 | 07.21 | 19.44 | 08.21 | 20.44 | 03.36 | 15.59 | 02.36 | 14.59 | 05.36 | 17.59 | 06.36 | 18.59 | 05.06 | 17.29 | 06.21 | 18.44 |
| 16. Okt. | 06.08 | 18.30 | 05.08 | 17.30 | 05.23 | 17.45 | 08.08 | 20.30 | 09.08 | 21.30 | 04.23 | 16.45 | 03.23 | 15.45 | 06.23 | 18.45 | 07.23 | 19.45 | 05.53 | 18.15 | 07.08 | 19.30 |
| 17. Okt. | 06.52 | 19.16 | 05.52 | 18.16 | 06.07 | 18.31 | 08.52 | 21.16 | 09.52 | 22.16 | 05.07 | 17.31 | 04.07 | 16.31 | 07.07 | 19.31 | 08.07 | 20.31 | 06.37 | 19.01 | 07.52 | 20.16 |

5 707265 100043 >